LØGTINGIÐ

Landsstýrismálanevndin

1) Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, Eirargarður 2, 100 Tórshavn
2) Karsten Hansen, landsstýrismaður, Postboks 2039, FO-165 Argir

**27.08.2008**
**j. nr. 7.13-20080007[5] ja/td**
(at tilskila í svari)

*Sagt verður frá, at soljóðandi skriv í dag er sent Kára á Rógvi, løgtingsmanni, Gundadalsvegi 22, FO-100 Tórshavn:*

**"Viðvíkjandi sølu av sjúkrahúsbygningum (íbúðabygningum, løgujáttan)**

Við skrivi, dagfest 21. apríl hevur landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum eftir áheitan sent Landsstýrismálanevndini skjølini í málinum. Landsstýrismaðurin vísir í skrivinum til eitt notat í málinum, har tikið verður saman um støðuna viðvíkjandi málinum, og upplýsir, at hann væntar at fáa eitt endaligt tilmæli frá umsitingini um, hvat skal henda í framtíðini viðvíkjandi bygningunum.

Við skrivi, dagfest 4. juni 2008, hevur landsstýrismaðurin eftir áheitan sent Landsstýrismálanevndini ummæli av málinum.

Á fundi í Landsstýrismálanevndini tann 3. juli 2008 hevur nevndin heitt á nevndarskrivaran um at gera nevndini eitt tilmæli sambært § 5, stk. 3 í starvsskipanini í sambandi við áheitan tygara um, at nevndin tekur málið um sølu av sjúkrahúsbygningunum og vantandi viðlíkahaldi av bygningunum til viðgerðar.

Sambært uppritinum, sum er hjálagt, hevur størsta partin av tíðini, frá tí at avgerðin um at selja íbúðabygningarnar varð tikin á heysti 2003 og til september 2007, verið arbeitt við at avgreiða formlig viðurskifti, sum eru fortreyt fyri søluni. Serliga hevur tað tikið rúma tíð at broyta byggisamtyktina fyri økið, har bygningarnir standa, eins og samráðst hevur verið um aðrar treytir, so sum treytir fyri útsjónd á bygningunum frameftir og parkeringsviðurskifti. Eyðkennið fyri hesi viðurskifti er, at aðalráðið hevur lítla ávirkan á málsgongdina, tí tað eru Tórshavnar Kommuna, Byggi- og býarskipanarnevnd landsins og Innlendismálaráðið, sum eru byggimyndugleikar, og sum taka avgerðirnar hesum viðvíkjandi.

Hvat viðvíkur spurninginum um virðismeting av bygningunum, so verður spurningurin um virðismeting/meting av innkomnum keypsboðum, eftir skjølunum í málinum at døma, mettur at verða aktuellur, áðrenn bygningarnir verða settir til sølu.

Við tilvísing til hetta, og samsvarandi § 5, stk. 1, nr. 1 í starvsskipan nevndarinnar hevur Landsstýrismálanevndin á fundi tann 26. august 2008 gjørt av ikki at taka málið til viðgerðar.



TINGHÚSVEGUR 1-3
POSTBOKS 208
100 TÓRSHAVN
TLF. 363900
FAX. 363901

Avrit av hesum skrivi er sent landsstýrismonnunum í almanna- og heilsumálum og fíggjarmálum til kunningar."

N.v.

Heidi Petersen
formaður